

## Havnarumsjónarfólk

Tórshavnar havn søkir eftir tveimum havnarumsjónarfólkum at byrja 1. november 2007, ella eftir nærri avtalu.

Annað arbeiðið er burturav skipað í skiftandi vaktum, meðan hitt partvís eisini er skipað sum vanlig arbeiðstíð, har arbeitt verður við serligum uppgávum so sum trygd, mannagongdum o.a.

**Førleikakrøv**
Tú skalt hava útbúgving sum skipsførari. Góðan málsligan førleika í enskum og føroyskum, bæði í skrift og talu. Teldukunnleika.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jónsvein Lamhauge, havnameistara á tlf. 311762.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu sendast til Tórshavnar havn, postboks 103, FO-100 Tórshavn, og vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. septembur 2007.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar havn**

---




# Lærarastarv í Viðareiðis Skúla

**Viðareiðis skúli søkir eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 at byrja 1. september 2007.**

**Søkt verður eftir:**
- Einum lærara á umleið 20 – 24 tímar um vikuna

**Tann, ið settur verður skal:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kann átaka sær at undirvísa í:**
- donskum í 3. flokki
- støddfrøði í 4. og 5. flokki
- føroyskum og náttúru/tøkni í 6. og 7. flokki
- tónleiki
- serligum tørvi

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Løn**
Lærarastarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsókn**
Umsókn við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 28. august kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis skúli** hevur komandi skúlaár 50 næmingar og 7 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid

---

At geva eina góða tænastu er okkara mál í gerandisdegnum. Í dag arbeiða 16 fólk hjá Wenzel, og fleiri teirra hava drúgvar royndir hjá Ford í Føroyum. Vit dagføra okkum støðugt við tí nýggjasta í bilverðini, soleiðis at starvsfólk okkara eru fakliga væl fyri.

## Søkt verður eftir lærlingi M/K til mekaniska verkstaðið

P/F Wenzel leggur stóran dent á kundanøgdsemi, og tí ynskja vit nærlagni og álit frá umsøkjarunum. Vit stilla stór krøv til starvsfólki, men kunnu tiskil eisini veita eitt gott og varandi arbeiði undir skipaðum viðurskiftum og góðum arbeisumhvørvi, har tað eisini eru umráðandi, at starvsfólkið trívist.

Meira fæst at vita um starvið, við at ringja til Páll á tlf. 354515

Skrivlig umsókn og ummælir verða at senda til:

**P/F Wenzel**
Postboks 3043
110 Tórshavn
Merkt lærlingur

**Seinasta freist er 3. september**

Eisini er møguligt at telduposta umsóknina til: pab@wenzel.fo

**P/F Wenzel**
Akranesgøta 5 · FO-100 Torshavn
tlf: 354500 · fax: 354501
fordpost@wenzel.fo · www.wenzel.fo

---




## M/S Raðhamar FD 457
### við fiskiloyvi

**Skipaslag:** .......Trolbátur
**Byggiár:** ..........1984
**Klassi:** .............Bureau Veriias
**Maskina:**.........Mitsubishi 480 HK (frá ár 2000)
**Stødd:**..............23,50 x 6,80 m
**Lastakap:**........740 stk. 75 litur kassar
**Fiskiloyvi:** .......4B + dagar (= 145 fiskidagar)

Vinarliga seti tykkum í samband við:

MARETEC
Skipsmeklaravirkið
Tel. 31 77 88
shipsale@maretec.fo
www.maretec.fo

---

## Frá Svínoyar Kommunu

27. august, verður fólkaatkvøða, um samanlegging ímillum Klaksvíkar og Svínoyar Kommunur, frá kl. 13.00 til 16.00, í lærarahúsinum.

Borgarar í Svínoyar Kommunu, kunnu frá 21. til 23. august greiða brævatkvøðu á hesum støðum, Klaksvíkar Kommuna, Miðlan, Tórshavnar Kommuna, Snarskivan og í Svínoy, við at venda sær til valnevndina.

**Svínoyar Kommuna**

---

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo